# Vinnuhúsið vil ávirka samfelagið

**Nú er nærum eitt ár síðan at Vinnuhúsið flutti inn í snotiligu húsini í Smærugøtu. Húsini hava givið nakrar áhugaverdar møguleikar, ið kunnu fáa stóran týdning fyri føroyskt vinnulív og fyri Føroyar.**

VINNULÍV
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*



Í snotiligu hølunum í Smærugøtu hevur føroyska vinnulívið fingið neyðuga plássi til at vera við til at skumpa eitt sindur undir føroyska vinnulívsgrannsking. Vinnuhúsið hevur nýliga søkt eftir einum starvslesandi, ið skal sita í húsinum og arbeiða í eitt hálvt ár.

Jan Mortensen stjóri í Vinnuhúsinum sigur seg vóna, at hetta kann kveikja áhugan hjá hesum lesandi at gera serritgerð við støði í føroyskum vinnulívi. Eisini vónar Vinnuhúsið, at kunna geva fólki, ið skriva serritgerðir við støði í vinnulívinum møguleikar at sita í húsinum og arbeiða. Hetta er í trá við hugsanina um at fáa føroyska granskingin meira málrættaða.

### Størri tilknýti

Betraðu hølisviðurskiftini hevur givið Vinnuhúsinum møguleika at halda allar fundir í egnum hølum, og hetta gevur á limafeløgunum størri tilknýtið til húsið og styrkir felagskapin. Fyrr vóru tey noydd, at halda størri fundir í leigaðum hølum, men hetta er nú broytt. Jan Mortensen heldur hetta vera sera týdningarmikið fyri eitt samtak sum vinnuhúsið.

### Týdningarmikil viðleikari

Vinnuhúsið umboðar 16 arbeiðsgevarafeløg. Samstarvið hevur verið til síðan í 80'árunum, men alsamt fleiri feløg eru komin til. Síðan í seinnu helvt av 90'árunum hevur felagið profilerað seg meira málrættað sum felagseindin Vinnuhúsið og hevur í størri mun verið við til at seta dagskránna í samfelagskjakinum. Fyri hetta vóru tað mest einstøk mál samtakið viðmerkti. Men nú tekur Vinnuhúsið størri samfelagsligar spurningar upp og er ein týdningarmikil viðleikari í føroyskum samfelagsviðurskiftum. Jan Motensen sigur, at Vinnuhúsið sjálvandi vil hava ein leiklut í samfelagsskipanini. Tað er týdningarmikið fyri demokratiið, at vinnufeløg og fakfeløg luttaka í samfelagskjakinum og geva politisku skipanini eitt meira kvalifisera støðið at byggja sínar avgerðir á, sigur Jan Mortensen.

Hetta verður millum annað gjørt við at skipa fyri ráðstevnum sum t.d. Offshore Faroes 2006, ið verður hildin í hesum døgum.

### Visión 2015

Í sambandi við Visión 2015 hevur Vinnuhúsið sett ein strategibólk, at gera frágreiðingar, ið kunnu vera við til at lýsa viðurskiftini og ávirka avgerðirnar. Bólkurin hevur gjørt frágreiðing við tilmælum um dynamik í kapitalvirkseminum, og seinasta mánaðin eru tvær frágreiðingar komnar um útbúgving og gransking. Tann seinna hesum var løgd fram í farnu viku, og hendan frágreiðing hyggur at, hvussu granskingarumhvørvið í Føroyum er skipað og kemur við tilmælum til broytingar.

Jan Mortensen vísir á, at skúlagongdin er ein sera týdningarmikil partur av menningini av arbeiðsorkuni í samfelagnum. Tí sær Vinnuhúsið tað, sum sína ábyrgd og í sínum áhuga at geva sítt íkast til kjakið um skúlaskipanina.

### Tænastur skulu gerast betur

Hann sigur, at Vinnuhúsið, sum er, er nøgt við sín leiklut í samfelagnum. Vinnuhúsið livur av limagjaldinum hjá limafeløgunum, og hetta avmarkar í sær sjálvum virkseminum í at vaksa nógv meira. Men arbeitt verður alla tíðina við at gera tænasturnar til limirnar betur. Millum annað við at betra heimasíðuna og tær tænastur, ið verða veittar umvegis hana.

Í løtuni starvast 6 fólk í Vinnuhúsinum. Í mun til 2 fyrst í 90'árunum. Nýggju húsini gera arbeiðsumhvørvið betur og hetta ávirkar sjálvandi arbeiðslagið hjá okkum, ið starvst her, sigur Jan Mortensen, ið seinastu árini er vorðin almenna andlitið hjá føroyskum vinnulívi.

# Autisma og visjón 2015

Almennur pallborðsfundur verður í Miðlahúsinum í Vágsbotni týskvøldið 17. januar kl 19.30 við heitinum:

Hava fólk við autismu tað líka so gott sum tú og eg í 2015 – og hvat gera vit meðan vit bíða?

### Tey, ið luttaka á fundinum verða:

Lennart Pedersen, sálarfrøðingur og fakligur ráðgevi frá Center for Autisme í Danmark
Morten Carlsson, foreldur og formaður í Landsforeningen Autisme í Danmark
Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í Almanna- og Heilsumálarráðnum
Umboð frá Mentamálaráðnum og Sernámsdeplinum
LFA – Landsfelagið fyri fólk við autismu skipar fyri fundinum.



*Morten Carlsson, foreldur og formaður í Landsforeningen Autisme í Danmark*



*Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í Almanna- og Heilsumálarráðnum*